
Karis Justesen er spent uppá stevnuna – og tað eru døtur hennara eisini

Mynd: Høgni Thomsen

## Serstøk skrá á Fjarðastevnuni

Strendur: Um vikuskiftið er Strendur vertur fyri ársins Fjarðastevnu. Eitt stórt arbeiði er lagt í at gera skránna so áhugaverda sum tilber. Men er hetta so einfalt í hesum døgum, tá øll tosa um at bygdastevnurnar eru deyðar – og serliga, tá hon bara er fjórða hvørt ár á Strondum?! – Tað eru bæði vansar og fyrimunir við at hava eina stevnu fjórða hvørt ár, sigur Karis Justesen, sum samskipar tiltøkini á stevnuni. Fyrimunurin er, at ein kann ofra seg eitt sindur meiri, tá tað er so long tíð millum hvørja ferð. Hinvegin so kann verða neyðugt at "vinda seg eitt sindur í gongd", tá so langt er ímillum. – Men tá er sagt, er tann størsti fyrimunurin helst, at ein hevur góða tíð at fyrireika seg ordiliga væl. Tá kann ein betri finna uppá okkurt nýtt, heldur enn altíð at detta aftur á tað sama, sigur Karis Justesen. Eitt sum kemur at sermerkja stevnuna í ár er at leygardagin er 07.07.07 – og tá fara helst mong í brúdleyp kring alt landið.

# Fari sjáldan út tveir dagar á rað

**Ein tilkomin maður liggur á knæ umborð á útróðrarbátinum "Hvalurin" og leitar eftir onkrum í øðrum borðinum.**
**- Tað var illa, tí nú hvarv knívurin afturum her. Eg fái ikki fatur á honum, og tað gert tú neyvan heldur við tínum stóru hondum!, sigur útróðrarmaðurin, Bjarti Thorleifsson.**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Strendur:** Tað er av allar fagrasta veðri her í stóra smábátahylinum á Strondum.

Í dag liggja flest allir bátar inni, men tað sakar einki, tí her er gott pláss til hvønn einasta teirra. Skipað er nevniliga soleiðis fyri, at teir kunnu liggja bæði trygt og gott, og kunnu haraftrat liggja við síðuni inn móti bryggjuni.

Hin 76 ára gamli Bjarti er farin sær ein túr oman í bátin. Tað var líka okkurt sum hann skuldi rigga til, áðrenn hann leggur út á næsta útróðrartúrin.

Bátin fekk hann fyri trimum mánaðum síðani av Argjum, og hann hevur alt tað sum skal til fyri at kunna virka sum slíkur.

- Men, satt at siga, so ætli eg mær ikki at dríva so øgiligt á við útróðrinum. Eg havi tað faktiskt heldur ikki fyri neyðini, sigur Bjarti við Sosialin.

### Øll apparatini

Líka síðani Bjarti fekk henda bátin, hevur hann brúkt rættiliga nógvar tímar í honum fyri at rigga hann til útróður.

- Hann hevði ikki nógv av nøkrum, tá eg keypti hann.

- Men nú er hann blivin doyligur, tí nú hevur hann fingið øll apparatini, greiðir Bjarti frá.

Henda týsdagin í farnu viku, tá vit vitjaðu á Strondum, hevði hann rokast eina løtu og hevði altso beint frammanundan mist knívin á dúrkið.

Burtur var knívurin. Og burtur varð knívurin!

### At dríva útróður

Hóast komin væl upp í árini, so dámar Bjarta sera væl at leggja frá landi og fara til útróðrar.

Hann viðgongur tó, at hann ikki er so ofta við bátinum sum onkutíð - og sum aðrir.

- Noy, tað er ikki so ofta longur. Eg eri ikki maður at dríva tað uppá sama máta sum teir ungu.

- Tá eg havi verið úti ein dag, fari eg sjáldan avstað aftur dagin eftir, sigur Bjarti.


- Eg eri ikki so ofta á útróðri longur, sigur 76 ára gamli Bjarti Thorleifsson

Mynd: Høgni Thomsen

### Ein sannur rokari

> *Eg eri ikki maður at dríva tað uppá sama máta sum teir ungu.*

Báturin sum Bjarti rør út við er 34 føtur langur. Tað serliga við hesum bátinum er, at hann í roynd og veru ein gamal grønlandsbátur og kallaðist "Hvalurin", eins og hann ger tað í dag.

- Hetta var ein ordiligur rokari har yviri, skal eg siga tær, sigur Bjarti við einum brosi.

Hann róði sjálvur út í Grønlandi við einum nýggjum báti, sum var komin um somu tíð sum hesin, ið hann nú hevur.

Teir róðu út í norðaru havnini á Ravns Stóroyggj. Tað gekst kortini illa at sleppa til útróðrar altíð og stund, hóast menn fegnir vildu tað.

Hetta eina árið var nevniliga eitt rættiliga ísár, og tí vóru menn nógv tarnaðir av ísi, men sluppu kortini út viðhvørt.

- Men hesin her - hesin báturin, hann var ein tann ídnasti at fara avstað. Og tað vísti seg eisini, at hann altíð kom aftur við líka nógvum.

- Hann kom mangan tungur at landi, minnist Bjarti afturá.

Starvsfólk til:
INTERSPORT
Tórshavn

**Søkt verður eftir lærlingi til Thomas Dam ítrótt í Tórshavn.**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar. Umframt handilin í Tórshavn hava vit eisini ein á Glyvrum og ein í Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta læru-pláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:
*Thomas Dam Ítróttur*
*Niels Finsensgøta 5*
*Boks 268*
*FO-110 Tórshavn*

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR
Niels Finsensgøta 5 · boks 268 · FO-110 Tórshavn

www.dkexport.dk



**Reservedele skaffes til**
**Entreprenørmaskiner – Lastbiler**
**Busser – Maskiner m.m.**
Sender dagligt med skib / luftpost.
Entreprenørmaskiner købes og sælges

DKEXPORT.DK
IMPORT – EXPORT

Tlf: +45 7461 3940 Fax: +45 7461 4164
Mobil: +45 2027 0064 e-mail: johnny@dkexport.dk